gult cyan magenta svart



# Miðbýarætlanir til umrøðu

**Borgarstjórin í Havn, Jan Christiansen, sigur, at ymiskt er frammi millum býráðspolitikarar viðvíkjandi fríðkan av høvuðsstaðnum**

MIÐBÝURIN
*Dagfinn Olsen*

Miðbýurin í Havn er nógv broyttur, um vit samanbera hann við útsjóndina fyri 20 til 25 árum síðani. Smærri broytingar hava støðugt verið seinnu árini.

Jan Christiansen, borgarstjóri í høvuðsstaðnum og royndur býráðspolitikari sigur, at seinnu árini er ymiskt gjørt at fríðka um kring miðbýin.

Hann nevnir nýløgdu flísarnar kring Gamla Bókhandil og annað.

– Eg veit ikki, hvussu nógvar ætlanir eru ítøkiligar júst nú. Frammi hevur verið at leggja ferðsluna um og at fríðka um t.d. á Káta Horninum, sigur Jan Christiansen.

Á Káta Horninum eru longu strípur komnar í vegin, so ferðslan verður beind ávísar vegir.

Jan Christiansen nevnir, at ymsar tekningar hava verið á borðinum hjá tekniskudeild hjá Tórshavnar Býráð, men hann sigur, at í løtuni er avmarkað við ítøkiligum ætlanum, men ymiskt er frammi í kjakinum millum býráðspolitikarar. Hann leggur dent á, at tað er frammaliga í huganum á politikarum, at hava Miðbýin hugnaligan, so óivað verður eitt og annað á broytingar leið at síggja, nú eins og áður, til frama fyri trivnaðin.

# Kalt vár við heitum tiltøkum

**At vit júst eru komin framvið jólum, nýggjári og føstulávint merkir skránna hjá Kuningarstovuni í Havn. Eftir yvirmettaða skrá, er nú meira rúmsátt. Felags fyri tiltøkini í hesum kuldanum er, at tey flest øll eru innanveggja og nøkur eru sera forvitnislig og nýskapandi**

MIÐBÝURIN
*Dagfinn Olsen*

Á kunningarstovuni í Havn starvast tey enn sum áður við at leggja til rættis og samskipa ymisk tiltøk í høvuðsstaðnum.

Ingigerð á Trøðni sigur frá Kunningarstovuni, at júst nú er ikki so nógv á skránni, men tó so, tí alla tíðina er okkurt.

Jólini og nýggjár eru farin framvið við hópin av tiltøkum og í so mangar mátar eru januar og februar heldur linligari mánaðir. Men nú tekur at vára, hóast kulda og kava.

Ymisk tiltøk eru á skránni og flest øll eru tey undir taki undir meira fjálgum umstøðum.

Millum tiltøkini í Havn komandi vikurnar eru til dømis tiltakið Aftur í 60'ini, sum verður 20. og 21. apríl. Michael Learns to Rock hevur konsert tann 9. mars. Hesi tiltøk verða í Høllini á Hálsi.

### Weekend

Í Sjónleikarhúsinum verður í hesum døgum sett hol á nýtt tiltak. Kári Petersen er veteranur í Sjónleikarhúsinum og hann stendur á odda fyri tiltakinum Várskemt, ið av stigtakaranum verður sagt at innihalda søgu, skemt, sang, tónleik, nostalgi og eitt vet av ørskapi.

Tann 17. mars verður frumframførsla av nýggjum føroyskum sjónleiki á Meiarínum. Talan er um leikin "Eitur nakað land Weekend". Jóanes Nielsen vann við hesum leikritinum kappingina hjá Leikpalli Føroya fyrr í ár.

Umframt hetta, so er eisini árliga várframsýningin í Listaskálanum á skránni.

### Mentanarnátt

Millum meira spennandi og nýskapandi ætlanirnar hjá Kunningarstovuni, er ætlanin um eina sonevnda kulturnátt, mentanarnátt. Hetta er kent aðrastaðni, t.d. Keypmannahavn í fjør.

Til slík tiltøk er vanligt, at nærum alt er opið, eisini almenn støð og stovnar. Soleiðis fáa fólk møguleika at vitja støð, ið tey vanliga ikki vitja ella høvdu komið annars. Í Keypmannahavn var m.a. Fólkatingið opið, eins og hópurin av almennum støðum.

Ingigerð á Trøðni vil ikki siga so nógv um tiltakið enn, tí enn er nakað tíðliga. Men hon sigur, at ætlandi verður hetta tiltak einaferð í juni ella juli. Og sum vit kenna tað aðrastaðni, so verður roynt at fáa so nógv sum gjørligt við uppá tiltakið. Av Kunningarstovuni verður sagt, at handlar og stovnar, sum samband hevur verið við, hava tikið væl ímóti hugskotinum um eina mentanarnátt í høvuðsstaðnum.

Nærri fæst at vita um tiltøk við at leita inn á heimasíðuna hjá Kunningarstovuni: www.kunning.fo




*Tekning av ætlanum fyri Miðbýin í Havn. Hóast avmarkaðar ítøkiligar ætlanir júst nú, so er ymiskt á tekniborðinum og býráðspolitikarar hava ymiskt frammi í práti sínamillum, sigur Jan Christiansen, borgarstjóri*

Visti tú ikki tað? Sosialurin



Stóra
BÓKAÚTSØLAN
heldur fram
til dømis:
Julebrygg
128 kr.
Nú 48 kr.
Den fuldkomne storm
249 kr.
Nú 79 kr.
Skide godt Egon
249 kr.
Nú 129 kr.
Fleiri bøkur eru komnar heim
H. N. JACOBSENS
BÓKAHANDIL
Vaglið 1 - tlf. 31 10 36

NÓGV NÝTT
HEIMKOMIÐ
Frá WEARHOUSE CORPORATION t.d.
Ternutar buksur 3/4
lilla • sand
Ymiskir yvirdeilar
lilla • sand • ljósabláir
kr. 369,-
Undirkjólar
svartir • lilla • offwhite • ljóst grønir
kr. 249,-
Drúgvur leygardagur opið er til kl. 17
Útsøluendabrestur
Restirnar frá útsøluni verða seldar ÷20% av útsøluprísinum
mótaskálin
Dr. Jacobsensgøta 20
Tórshavn Tlf. 31 53 17

Gullhornið
Letur 20%
av allari vøru, til langan leygardag.
GULL-HORNIÐ
v/ L.E.H.N
Bringsnagøta 1 • Dandastova
FO-100 Tórshavn
Tel. 314430, heima 318361

i
Sosialurin

KJALLARIN
langur leygardagur
TILBOÐ
bert leygardagin
Uttan mun til áður prís [frá 3.000,-]
Nú 499,-
Rullukraga troyggjur
Troyggjur
Jakkar
Buksur
Blusir
REST SKÓTOY
uttan mun til áður prís
NÚ 199,- / 299,-
REST STYLVAR
høgir og lágir
FYRR 1.200,-
NÚ ÷ 50%
Harra acupuncture
FYRR 998,- NÚ 499,-
Sosialurin - Tel. 311820
KJALLARIN
list og húsgøgn
Áarvegur 5 - Tlf. 31 37 20

Stóra bringu
ella lítla?
Ert tú ein av teimum 80%, ið ganga í skeivari BH-stødd?
Støkk so inn á gólvið hjá okkum og vit hjálpa tær at finna júst tína stødd.
Vit hava BH í støddum úr 65 til 110 cm í ummáli, og frá AA til H skál.
Vit hava eisini korsilett í stórum støddum
siri
lív & heilsa
Sosialurin - 311820
Dr. Jacobsensgøta 18 • 100 Tórshavn • Tel./Fax 316610

Heimasíður
Framkomnar web-loysnir
VIT
www.vit.fo
Undir Bryggjubakka 17
FO-100 Tórshavn
Tlf. 319914

veitst tú ikki tað?

Norðurlandahúsið í Føroyum
Sí SVF tekstvarp s. 650